# Sjónvarpið við í evstu løtu

**Tveir mans frá Sjónvarpi Føroya eru til staðar í Hannover í kvøld, eftir at sjónvarpið í evstu løtu tryggjaði sær rættindini at senda dystin beinleiðis**



*Hóast skotbráið ikki var tað stóra, sendi Sjónvarp Føroya bæði Tórð Mikkelsen (myndin) og myndamannin Ragnar A. Jacobsen avstað til Týsklands, tá rættindini at senda dystin beinleiðis vóru komin upp á pláss*

*Savnsmynd*

TÝSKLAND-FØROYAR
*Hilmar Jan Hansen*

Tað var ikki fyrr enn fríggjakvøldið, beint áðrenn »Dag og viku«, at Sjónvarp Føroya langt um leingi kom ásamt við týska felagið Sport-A um, at sjónvarpið kann sleppa at senda beinleiðis frá dystinum á Niedersachsen Stadion í Hannover í kvøld.

Tá dysturin í Kaunas millum Litava og Føroyar varð sendur leygardagin, fekk Sjónvarp Føroya myndirnar úr Litava, men hevði so Tórð Mikkelsen og Jóannes Jakobsen sitandi í sjónvarpsstovuni í Vørðsluni, har teir í grundini ikki sóu annað enn tað, øll onnur eisini kundu síggja heima í sínari egnu stovu.

Í kvøld verður øðrvísi, tí bæði Tórður Mikkelsen og myndamaðurin Ragnar A. Jacobsen eru longu farnir til Hannover. Tórður fer at siga frá dystinum á stadion, og møguliga fær hann onkran aftrat sær sum viðmerkjara, men tað var ikki greitt í skrivandi løtu.

Annars fara teir báðir at tryggja sær orð og myndir til okkurt, ið kann sendast aftaná. Møguliga verður tað til eina størri sending um hesa størstu landsdystaravbjóðingina hjá Føroyum nakrantíð, ella verður tilfarið brúkt í tíðindasendingum ella aðrastaðni, har tað hóskar í skránni hjá sjónvarpinum.

### Prísurin fall

Bara tað at fáa rættindini til landsdystin í kvøld hevur tikið sína tíð, og í Sjónvarpi Føroya hava tey lagt nógva orku í at sannføra týskarar um, at rættindini áttu at vera latin fyri ein sámuligan prís.

Og tá avtornaði, gjørdist talan eisini um ein prís, ið Sjónvarp Føroya sá seg ført fyri at gjalda fyri dystin, ið sjálvandi hevur alstóran áhuga í Føroyum.

– Fyrsta kravið hjá teimum upp á 120.000 krónur var ikki nakað, vit kundu brúka, tí vit áttu snøgt sagt ikki teir pengarnar, sigur Øssur Winthereig, tíðindaleiðari í Sjónvarpi Føroya.

– Men at enda fingu vit sannført teir um, at tað var best fyri báðar partar, at prísurin fór nakað væl niður um tað. So sluppu vit at senda dystin, og so fingu teir hóast alt tær krónurnar meira burtur úr dystinum. Sosialurin skilir, at prísurin endaði á umleið 40.000 krónum, og Øssur avvísir ikki, at upphæddin liggur har á leið.

### Allar uttan ein

Við øðrum orðum hevur Sjónvarp Føroya nú fingið rættindi til sjey av teimum átta dystunum, sum Føroyar spæla í hesari EM-undankappingini. Dystirnir móti Skotlandi heima og Litava úti eru longu vístir, og í kvøld verður so útidysturin móti Týsklandi á skíggjanum.

Einasti dysturin, ið enn ikki er komin upp á pláss, er útidysturin móti skotum, sum verður spældur 6. september næsta ár. So enn er góð tíð at fáa fatur á teimum rættindunum, ið skotska felagið IMG umsitur.

– Eitt annað, vit helst mugu finna útav, er um nakar annar møguliga hevur áhuga fyri útidystinum hjá okkum móti Íslandi, tí tað hevði gjørt tað nógv lættari hjá okkum, sigur Øssur Winthereig.

– Nú tá vit sendi Litavadystin, var tað EBU, ið syrgdi fyri at fáa signalið upp í luftina, so vit kundu taka tað niður her í Føroyum. Men hava hvørki teir ella aðrir enn vit uttan fyri Ísland áhuga fyri at senda tann dystin, kann tað gerast ein størri uppgáva hjá okkum at fáa fatur á útgerð, sum letur okkum senda signalið millum londini.

Hvussu verður við tí, er eisini nakað, ið kann bíða, tí tað er ikki fyrr enn næsta ár, at tann dysturin spældur. So fyribils kunnu hyggjararnir gleða seg, til Týsklandsdysturin í kvøld kemur á skíggjan…

## Landsdystir í dag

**EM-bólkur 1**
19.45: Malta-Frakland (Ta' Qali)

**EM-bólkur 2**
19.00: Norra-Bosnia/Herzegovina (Oslo)
19.00: Luksemburg-Rumenia (Luxembourg)

**EM-bólkur 3**
15.30: Tjekkia-Hvítarussland (Teplice)
19.30: Eysturríki-Holland (Wien)

**EM-bólkur 4**
19.30: Ungarn-San Marino (Budapest)

**EM-bólkur 5**
19.10: Ísland-Litava (Reykjavík)
19.30: Týskland-Føroyar (Hannover)

**EM-bólkur 6**
18.00: Grikkaland-Armenia (Athen)
20.00: Norðurirland-Ukraina (Belfast)

**EM-bólkur 7**
18.30: Turkaland-Liktinstein (Istanbul)
20.00: Ongland-Makedonia (Southampton)

**EM-bólkur 8**
16.00: Bulgaria-Andorra (Sofia)
19.30: Estland-Belgia (Tallinn)

**EM-bólkur 9**
18.00: Jugoslavia-Finland (Beograd)
19.45: Wales-Italia (Cardiff)

**EM-bólkur 10**
16.00: Russland-Albania (Volgograd)
19.30: Írland-Sveits (Dublin)

**Venjingardystir**
18.15: Poland-New Zealand (Ostrowiec)
19.00: Svøríki-Portugal (Göteborg)
20.00: Skotland-Kanada (Edinburgh)
20.45: Spania-Paraguay (Logrono)



# Jógvan Arge hevur útvarpað teir flestu

**Tá dómarin í kvøld klokkan hálvgum átta setir dystin millum Týskland og Føroyar í gongd, eru útvarpsmenninir Jógvan Arge og Suni Merkistein á staðnum. Og tað er útvarpið hvørja ferð**



*Útvarpið er altíð við, tá Føroyar spæla landsdyst í fótbólti, og eins og í Kaunas leygardagin, verða tað Jógvan Arge og Suni Merkistein, sum í kvøld fara at siga frá dystinum millum Týskland og Føroyar á Niedersachsen Stadion í Hannover*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

TÝSKLAND-FØROYAR
*Hilmar Jan Hansen*

Síðani Føroyar í 1988 fóru upp í altjóða fótbólt og í 1990 upp í sína fyrstu undankapping, hevur Jógvan Arge verið oftari við enn nakar av spælarunum.

– Eg haldi, at eg havi verið við til at útvarpað allar dystirnar uttan ein ella tveir, so teir munnu vera einir 70 í tali. Og við tí, sum var áðrenn altjóða viðurkenningina hjá føroyskum fótbólti, man eg skjótt fara at nærkast teimum hundrað dystunum, sigur hann.

Tey fyrstu altjóða árini hjá landsliðnum varpaði Jógvan út saman við beiggjanum Magna Arge, men tá Magni bleiv stjóri í Atlantsflog fyri einum fimm árum síðani og gavst við útvarpingini, tók Suni Merkistein við og hevur verið við síðani.

Sostatt eru tað Jógvan og Suni, sum í kvøld fara at siga frá dystinum, og saman við sær hava teir eisini teknikaran Hjalmar Hvítklett, sum eisini hevur verið við nógvar ferðir.

Men hvørki Hjalmar ella nakar av hinum teknikarunum hava møguleika at taka metið hjá Jógvani, tí meðan útvarpararnir aloftast eru teir somu á landsliðsferðunum, gongur kjansurin upp á skift millum teknikararnar.

Umframt at senda frá sjálvum dystinum, hevur útvarpsmanningin eisini latið tilfar til tíðindasendingarnar og soleiðis latið frætta frá føroyska liðnum fleiri ferðir á hesi ferðini, ið byrjaði í Litava og nú endar í Týsklandi.

### Tiknir í álvara

Hóast dysturin í kvøld kanska er nummar hundrað ella har á leið hjá Jógvani, so er øll upplivingin rundan um júst henda dystin nakað heilt serligt - eisini fyri veteranin:

– Fyri tað fyrsta kann eg siga tað, at hesin dysturin móti Týsklandi uttan iva er størsta avbjóðingin nakrantíð hjá einum føroyskum landsliði, sigur Jógvan Arge.

– Men so vil eg eisini leggja tað aftrat, at tað allarstuttligasta kanska er tað, at mótstøðuliðið – so øgiligt tað enn kann tykjast – tekur Føroyar í fullum álvara. Og tað sigur nakað um stóru menningina í føroyskum fótbólti hesi síðstu árini.

Jógvan sigur, at ein slíkur hugburður vildi verið óhugsandi fyri bara fimtan árum síðani, tá Føroyar í allar mátar ikki blivu roknaðar fyri annað enn ein pinkutjóð, ið lítið ella einki formáddi sær á einum fótbóltsvølli móti størri tjóðum.

Hann sigur tað heldur vera heilt øvugt í dag, tí eingin av týsku spælarunum hevur sagt seg taka tað sum givið, at dysturin verður vunnin lættliga, hóast favorittleikluturin hjá Týsklandi sjálvandi er greiður.

At hetta so eisini er fyrsti heimadysturin hjá týska landsliðnum, eftir at tað í summar gjørdist nummar tvey í kappingini um heimsmeistaraheitið, gevur ein náttúrligan áhuga fyri dystinum móti føroyingum.

– Eg kann í hesum sambandi nevna, at týskarar eru so spentir, at borgarstjórin her í Hannover nú ein av døgunum uppi á einum palli á torginum tosaði um dystin, greiðir Jógvan frá.

– Tá helt hann fyri, at eingin ivi átti at verið um, hvør fer at vinna dystin. Við tí sipaði hann til, at fólkatalið í Føroyum ikki er meira ein tíggjundapartur av tí, sum býr í bara Hannover.

### Landskrona-hýrur

Tá vit biðja Jógvan Arge seta orð á hýrin og lagið, ið er undan hesum dystinum, hevur hann bestan hugin at samanbera upplivingina í Hannover higartil við ta ferðina, tá Føroyar fyri tólv árum síðani bíðaðu eftir at møta Eysturríki í suðursvenska býnum Landskrona.

– Men hóast tað í nógvar mátar minnir um, so er hetta jú nógv størri, tí tað er nummar tvey í verðini, sum hesa ferð stendur yvir av okkum, tá dysturin fer í gongd, sigur hann.

– Tá eg nevni, at hetta er tað størsta síðani dystin móti Eysturríki, so skuldi eg kanska eisini nevnt tann næsta dystin tá, sum var í gomlu Ítróttarparkini móti Danmark. Men aftur er hetta øðrvísi, nú vit verða mettir sum javnbjóðis mótstøðulið hjá sjálvt Týsklandi.

Jógvan Arge heldur lítlan iva vera um, at tað var góði 2-2 javnleikurin móti Skotlandi á Svangaskarði fyri einum góðum mánaði síðani, ið hevur gjørt sítt til, at virðingin fyri Føroyum er at finna allastaðni undan hesum dystinum.

– Tað úrslitið setti prikkin yvir i'ið, tá vit hugsa um marknaðarføring frá okkara síðu í sambandi við henda landsdystin. Skotlandsdysturin varð vístur beinleiðis í týskum sjónvarpi, og her í Hannover veit hvørt mansbarn, hvat Føroyar eru og hvat vit hava avrikað í fótbólti, sigur útvarpsmaðurin.

– At hetta eisini er nakað stórt, merkja vit alla tíðina, og sjálvur skal eg ikki dylja fyri, at eg eri spentur til dystin. Avbjóðingin hevur ið hvussu er ongantíð verið størri enn nú.